## Pengar fyri mista kvotu



Íslendska stjórnin hevur samtykt at brúka 10,5 mia. íslendskar krónur tey bæði næstu árini fyri at tálma avleiðingunum av, at stjórnin í summar gjørdi av at skerja toskakvotuna ein triðing tey bæði næstu fiskiárini. Ætlanin er millum annað at framskunda verkætlanir so sum vegagerðir, men pengarnir skulu eisini styrkja vinnulívið kring landið. Sambært stjórnini fer játtanin at geva millum 500 og 600 arbeiðs- og útbúgvingarpláss.

## Týr limir í Klaksvík

Leygarkvøldið verður live-kvøld á Fortuna í Klaksvík Pól Arna og Jón. Tá Týr í 2001 royndu seg í Prix Føroyar finaluni, var tað við Pól Arna á odda, og við Jón Joensen á gittara. Jón stovnaði bólkin saman við beiggja sínum Hera Joensen, men stutt eftir fóru bæði Jón og Pól Arni úr bólkinum. Nú spæla teir saman, og spæla alskyns tónleik, føroyskan sum útlendskan og royna at leggja seg eftir fólkatónleiki, so sum írskar og skotskar vísur.

# Biskupsval á Trapputingi

**Sunnukvøldið verður alment Trapputing í Miðlahúsinum, har øll valevnini til biskupsvalið luttaka.**

KJAK
*Theodor E. D. Olsen*
*theodor@sosialurin.fo*

Í hesum døgum skulu umleið 400 kirkjuráðslimir og prestar taka støðu til, hvør skal vera bispur komandi árini. Valevnini eru Marjun Bæk, Jákup Reinert Hansen, Bergur Debes Joensen, Jógvan Fríðriksson og Uni Næs.

Í gjárkvøldið vóru valevnini í Missiónshúsinum í Leirvík, har tey løgdu síni sjónarmið fram fyri kirkjuráðslimun og prestum.

Sunnukvøldið er næsti »valfundur«. Hesin fundurin verður á Trapputinginum í Miðlahúsinum í Vágsbotni, har ætlanin er at spyrja valevnini, hvørji mál tey ætla at arbeiða við, um tey verða vald. Spurt verður millum annað eisini hvørjar avbjóðingar, tey halda verða tær størstu hjá nýyvirtiknu føroysku kirkjuni, og hvørjar tær týdningarmestu uppgávurnar hjá bispi verða.



*Teir flestu prestarnir, sum bjóða seg fram á bispavalinum halda, at tað skal bera til at skifta bisp við jøvnum millumbilum*

Fyri at verða uppstillaður til biskupsvalið, skal hvørt valevni hava minst 50 og í mesta lagi 150 stillarar, og skulu hesi verða antin kirkjuráðslimir ella prestar.

Freistin hjá teimum, sum hava valrætt, at atkvøða, er 3. oktober. Hevur einki av valevnunum fingið helvtina ella meira av atkvøðunum, fara tvey tey fremstu valevnini víðari til 2. umfar.

Orðstýrari á Trapputinginum í Miðlahúsinum sunnukvøldið kl. 20 verður útvarpsmaðurin Jón Brian Hvidtfeldt.

## Valevni svaraðu spurningum

Í hesum døgum hava gott 400 kirkjuráðslimir og prestar kring landið fingið atkvøðuseðlar sendandi, har tey skulu siga sína meining um, hvør skal vera nýggjur bispur.

Tað eru fimm prestar uppstillaðir at taka við eftir Hans Jacob Joensen, nú hann leggur frá sær 1. desembur. Í sambandi við biskupsvalið, hava valevnini tvær ferðir havt fund, har tey hava havt høvi til at siga sína hugsan um tær avbjóðingar, sum embætið ber í sær.

Síðsta vikuskiftið varð fundur í Havn, í gjárkvøldið var fundur í Leirvík. Í kvøld verður fundur í Suðuroy. Hesir fundir hava allir verið fyri at prestar og kirkjuráðslimir kunnu hoyra, hvørji sjónarmið valevnini hava um ymsar spurningar.

Men tann nýggi bispurin verður eisini fólksins bispur og sunnukvøldið fær almenningurin høvi at hitta og hoyra tey fimm valevnini á almennum fundi í Miðlahúsinum í Vágsbotni.

Eftir fundin í Havn høvdu vit frásøgn í Sosialinum um tey sjónarmið tey ymsu valevnini hava og tað koma vit at hoyra enn meiri um eftir fundin í Miðlahúsinum sunnudagin.

Í blaðnum í dag fara vit sostatt at tríva í onkrar av teimum spurningum, sum bylgist í barmi á vanligum kirkjuráðslimum og prestum og at umrøða onkrar av teimum spurningum, sum biskupsvalevnini fingu á fundinum í Leirvík.

Lagt til rættis. Áki Bertholdsen. Myndir: Høgni Thomsen.

# Bispur skal ikki sita fyri lívið

**Bispur skal vera áramálssettur og 5-10 ár í starvinum er nóg mikið,, halda tey flestu av teimum, sum bjóða seg fram at verða bispur**

Bispur skal ikki sita fyri lívið.

Tað halda tey flestu av teimum, fimm, sum nú eru í uppskoti til at verða nýggjur bispur.

Á fundinum í Leirvík í gjárkvøldið, vóru valevnini spurd um tey hildu, at bispur skuldi sita fyri lívið, ella um talan átti at vera eitt áramálssett starv.

Fýra av teimum fimm valevnunum, halda tað vera rætt, at bispur er áramálssettur og eitt hóskandi áramál kundi verið 5-10 ár.

Jógvan Fríðrikson er ikki ósamdur í, at bispur skal vera áramálssettur, men hann heldur eisini, at tað er ein vansi við tí.

- Tað kann væl hugsast, at bispur fer at brúka tey fyrstu fimm árini til at snøgga lógaverkið til og tí ikki hevur havt stundir at fáast við andaliga innihaldið í kirkjuni.

Sjálvur vil hann hava eitt opið samskifti og verður hann bispur, vónar hann, at tað hann fær tað at vita frá prestum og teimum, sum varða av kirkjuni, tá ið hann ikki røkir embætið nóg væl, men eigur at finna hurðina.

- Eg havi aldrin tikið mær tykni av tí, sum verður sagt við meg, men eg eri ofta særdur av tí, ið verður sagt um meg og tí havi eg onki ímóti at fáa tað at vita, tá ið eg ikki gera mítt arbeiði nóg væl, men heldur átti at funnið mær okkurt annað.

Marjun Bæk helt, at talan kundi vera um áramálssetning, men kortini mátti vera so langt ímillum valini - kanska 10 ár- at bispur fekk stundir at arbeiða sakliga við teimum uppgávum, hann hevði.

Uni Næs tekur eisini undir við eini áramálsseting, men hann er samdur í, at stundir mugu vera til at arbeiða við teimum kirkjumálum, bispur skal arbeiða við.

Eisini hann helt, at 10 ár var hóskandi.

Bergur Debes Joensen heldur, at hvørt valskeið skal vera fimm ár og at bispur kann í mesta lagi veljast aftur einaferð, so at ongin kann siga longri enn 10 ár, skuldi tað hent, at ónøgd var við arbeiðið.

Einasta valevni, sum er ímóti at áramásseta bisp, er Jákup Reinert Hansen, sum dróg samanberingar við løgtingið og hann vildi ikki hava biskupsvalevni í valstríði við jøvnum millumbili.

- Tað er øgiligt virksemi beint eftir val og tá ið tað nærkast vali aftur, verður alt øst upp aftur.

Hinvegin helt hann ikki, at bispur mátti ikki vera so sjálvhátíðarligur, at hann blívur sitandi, bara fyri at blíva sitandi og hann tók eisini undir við, røkir bispur ikki starvið nógv væl, fær hann tað at vita.